


**Nr. 17** ***13. august 2023*** **83. árg.**

# Guds hjálp í sorgini

Peggy Enerud var gestur hjá Marie Kaasa í Kanal 10. Peggy greiðir soleiðis frá:

„Eg var yngst av 7 systkjum og vaks upp við kristindóminum. Vit høvdu húsmøti heima hjá okkum, og eg gekk í sunnudagsskúla og á møti. Men í ungdómsárunum vendi eg Jesusi bakið og kom út í mangt ringt og eisini slíkt, sum var vandamikið, men Gud helt hondina yvir mær og vardi meg. Eg átti biðjandi foreldur, og tað vita vit, at tá eltir Gud teg og sleppur tær ikki.

Eg átti tríggjar deiligar dreingir og hevði gott arbeiði. At síggja til var alt í fínasta lagi, men innan var alt ein hurlivasi og fløkja. 17. juni í 2005 rakti ólukkan okkum. Eg var farin til arbeiðis, og sonurin Peter var í barnagarði. Alt í einum stóð løgreglan í hurðini á arbeiðsplássi mínum. Eg sá beinanvegin, at nú var okkurt ræðuligt hent, tí teir vóru rættiliga ávirkaðir av støðuni. Teir søgdu: „Peggy, vit hava eini ræðulig boð til tín. Sonur tín Peter er deyður.“

Eg boygdi knø inni á starvsfólkastovuni og rópti: „Góði Gud, nú mást tú hjálpa mær!“ Alt brotnaði kring meg, og eg fór í 1.000 petti. „Góði Jesus, hjálp mær, hjálp mær!“ Eg fekk sakkøna hjálp, har kom eitt hjálpartoymi við fólkum, sum høvdu ymsar førleikar. Tað hjálpti eitt sindur, men teir góvust eftir nøkrum mánaðum. Næturnar vóru ringast. Alt var myrkt uttan um meg. „Hví Jesus, er hetta mín skyld? Hjálp mær, Jesus,“ bað eg. Orðið sigur: „Nær er Harrin teimum staddur, ið hava sundurbrotið hjarta.“ Sálm. 34,19.

Eg var flutt heim til foreldur míni í nakrar mánaðir, eg orkaði ikki at vera í mínum húsi. Eina náttina lá eg á sofuni. Eg

lá og rópti og græt: „Tú mást hjálpa mær, Jesus. Eg orki ikki at liva." Tá alt í einum kendi eg eina hond á høvdi mínum, sum streyk mær eftir hárinum. Eg helt, at mamma var uppkomin at ugga meg. Eg fekk fullkomnan frið og sovnaði.

Morgunin eftir, tá ið eg kom upp, var mamma í køkinum. „Havi eg órógvað teg, so tú ikki fekst sovið í nátt?" spurdi eg.

„Eg hoyrdi, at tú lá og græt og skríggjaði, og eg ætlaði mær upp. Men so brádliga gjørdist kvirt, og eg hugsaði, at tú vart sovnað, og so vildi eg ikki órógva."

„Ja, men tú hevur ligið og strokið mær eftir hárinum."

„Nei, tað havi eg ikki," segði hon, „tú hevur biðið Jesus uggað teg, so tað hevur verið Hann, sum hevur strokið tær eftir hárinum."

Tá hugsaði eg: „Altso, kann Hann veruliga vera so nær, at tú kennir Hann fysiskt?"

Tá spíraði trúgvin aftur í mær, og eg bleiv forvitin eftir at lesa í Bíbliuni, og hon fekk alstóran týdning fyri meg. Í Jes. 49,13 stendur: „Harrin uggar fólk sítt." Og eg kann vátta, at tað er satt. Tá ið alt innan í mær kendist sum bruni, betendilsi í mínum særda sinni, tá kom Jesus har við sínum balsami."

*Effie Campbell.*

## Svar úr Bíbliuni

*Peggy Enerud*

Tá ið eg misti sonin, helt eg, at tað var Gud, sum revsaði meg fyri tað lívið, sum eg hevði livað í ungdómsárunum. Tá segði Gud við meg: „Peggy, les Sálm 103. Har stendur: „Hann fer ikki við okkum eftir syndum várum og lønir okkum ikki eftir misbrotum várum." Jesus tók revsingina á seg og við sárum hansara eru vit grødd, bæði innan í okkum og uttan á okkum. Jes. 53,5 Skrivað stendur eisini: „Í hond Tíni eru tíðir mínar." Sálm. 31,16 V.D. Harrin veit, hvussu nógvar dagar, vit skulu liva.

*e.c.* ums.

## Tablettir eingin loysn

*Peggy Enerud*

Tað var eitt tíðarskeið í lívi mínum, har eg hevði tað ræðuliga ringt. Tá segði onkur við meg: „Tú treingir til at fara til lækna."

Eg segði við læknan: „Tú mást geva mær eitt ella annað nú!!! Eg orki ikki hesar tankarnar og hesar kenslurnar!!!". Tá sigur

hann: „Tú fært einki frá mær. Eg skal siga tær eitt, hugsa tær ein stóran svartan hund, sum gongur leysur her uttanfyri, og tú ert frá tær sjálvari av ótta fyri honum. So komi eg og leggi eina tablett inn í munnin á tær. Hundurin gongur enn har. Men tú ert blivin líkasæl og dølsk, og tað er ikki gott. Tablettir kunnu vit taka í byrjanini av eini skelkandi støðu; men vit mugu ikki halda fram við tí. Tá gerast vit bundin av teimum."

*e.c.* ums.

# Gud uggar allar aldrar

*Peggy Enerud*

Tá ið eg misti yngsta sonin, hevði eg tveir dreingir eftir. Teir vóru eisini í stórari sorg, men teir vóru so ymiskir. Eldri drongurin var so afturlatin, meðan hin yngri var meira opin. Teir vildu ikki særa meg, men av tí at teir vildu spara meg, vildu teir ikki tosa um yngsta bróður sín, tí so hildu teir, at eg fór at gráta.

Kevin, yngri drongurin, græt nógv. Tá fór eg at biðja: „Góði Jesus, tú mást hjálpa mær at ugga børn míni."

Ein morgun, tá ið Kevin vaknaði, segði hann: „Mamma, eg havi droymt um Peter í nátt, hann spælir uppi í Himli. Hann hevur tað gott, mamma! Hann er hjá Jesusi, og hann spælir í Himli."

Tað uggaði synir mínar. Jesus dugir at bera uggan til øll aldursstig, allar aldrar. Jesus var ein góður stuðul, eg kundi leggja meg og dreingirnar upp í hansara hendur. Hann hevur umsorgan fyri okkum.

Um tað er soleiðis, at øll vón er brostin, so hava vit Jesus-trúgvandi eina LIVANDI vón. Tá okkara tíð her niðri er liðug, so skulu vit møta okkara kæru aftur, sum eru í Himli.

Eg vil peika á Jesus. Vit eru ævinleika-vallarar. Royn Jesus. Hann er Vegurin, Sannleikin og Lívið. Hann er Vegurin heim í Himmalin. Lívið her er so stutt. Brádliga kunnu boð vera eftir okkum. Jesus leggur ein frið inn í títt hjarta. Handa friðin kann verðin ikki geva. Hasin friðurin er sum eitt fast akker, sum gongur beint inn í Himmalin. Tú kanst kanska merkja, at stormurin rívur í tað. Men tað liggur trygt og fer ongan veg.

*Effie Campbell* umsetti.

# Enski prædikumaðurin

Kendi enski prædikumaðurin Smith Wigglesworth gekk ongantíð í skúla. Tá ið hann var 26 ár, lærdi konan hann at lesa. Tá tók hann ta føstu avgerð at avmarka lesing sína til Bíbliuna eina. Av tí at hann so seint í lívinum lærdi at lesa, kendi hann tað so, at hann átti at brúka hesi evnini til bara at lesa Bókina yvir øllum øðrum bókum.

Ein av grundunum til at Wigglesworth metti Bíbliuna so høgt, var Orðsins reinsandi megi. Hann trúði, at tað var neyðugt at vera andaliga reinur.

Hann segði við abbabarn sítt: „Leslie, um eg lesi bløðini, komi eg út aftur skitnari, enn tá ið eg fór inn. Tá ið eg lesi mína Bíbliu, komi eg reinari út, enn tá ið eg fór inn, og mær dámar at vera reinur!“

*e.c.* ums.

---

Fyri mongum árum síðani var tað ein hvalvíksdrongur, sum bleiv konfirmeraður. Prestur var danskur. Hann skrivaði í Nýggja Testamenti hjá dronginum hesi orð: „Kom med, kære Thomas, se vejen er åben, skynd dig til Jesus. Han døde for dig.“ Og niðriundir stóð hetta skriftstaðið: „Jesu, hans Søns, Blod renser os fra al Synd.“ 1. Joh. 1,7.

*e.c.*

---

Tað, sum í føroysku útgávuni av Nýggja Testamenti eitur „frelsa", eitur á grikskum sozo. Hetta orðið kemur 120 ferðir fyri í N.T. í 103 ymsum versum, og tað merkir nógv meira enn bara "frelsa". Tað merkir: **1.** heilsa **2.** grøddur **3.** gjørdur heilur **4.** útfríaður **5.** varðveittur **6.** frelstur.

*e.c.* ums.

---

Fólk leita eftir tryggleika og sannleika. Tey leita eftir álítandi menniskjum, sum hava meir enn bara orð.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 20. august | **Tekstur:** Matt. 17,1-13 | **Bíbliuorð:** Matt. 17,5b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 18** ***27. august 2023*** **83. árg.**

# B-vitaminir

*Emanuel Minos*

Eg havi nógvar vinir millum lutheranarar, m.a. Wisløff professara, sum hevur givið mær hesa Bíbliuna, og dr. Ejnar Lundby. Einaferð, tá ið Ejnar Lundby og eg vóru ungir, talaði hann um tær fýra B-vitaminirnar út frá Áps. 2,42: Bekennilsi (altso ápostlanna læru), brøðrafelagsskapurin (samfelagið), breyðbrótingin (altargangurin) og bønirnar (bønarmøtini). Á, tær fýra veldigu B-vitaminir, vit kristnu hava í endatíðini, meðan vit bíða eftir Jesu afturkomu.

Eg sigi tykkum, eg bíði ikki eftir oyðingini. Eg bíði ikki eftir atombumbum. Eg bíði ikki eftir yvirgangi. Eg bíði eftir einum brostnum skýggi. Ímeðan mugu vit taka til okkum av hesum kraftigu B-vitaminunum, og eg skal bara siga eitt sindur um ta seinastu, bønarmøtini.

Latið okkum fara inn í bønina fyri ætt og vinir, sum ikki enn eru frelst. Í okkara familju hava vit gjørt av at savnast eina ferð um vikuna at biðja fyri teimum í familjuni, sum ikki eru frelst. Eg trúgvi upp á kraftina í bønini, eg trúgvi upp á undrið í bønini. Vit liva í endatíðini, tá ið alt, sum hendi á Nóa døgum, skal henda. Men lyftini eiga vit. Lyftini hoyra tykkum og børnum tykkara til, sigur Skriftin. (Áps. 2,39).

Í 40 ár vóru ísraelsmenn úti í oyðimørkini. So fóru teir og tóku lyftislandið. Ein teirra, sum var við, var gamli Kaleb. Hann var 80 ára gamal, og tá byrjaði hann gerning sín. Latið okkum samla okkum um Harrans søk og inntaka lyftislandið. Føroyar skulu uppliva veking. Føroyar skulu uppliva Andans úthelling. Føroyar skulu fyrireikast at møta Jesusi á tí brostna skýnum. Men vit mugu vera tváað í lambsins blóði, hvítari enn snjó. Amen.

*Effie Campbell* umsetti.

# Sjónin hjá Montgomery við danska markið

Beint áðrenn seinni veraldarbardagi endaði, hevði Montgomery, yvirherstjóri, fingið tað starvið at herseta Danmark – greiðir hann sjálvur frá.

Hesin viðgitni herstjóri hevði gjørt tað til sín vana at fara einsamallur heilt út til jaðaran á vígvøllinum og skoða yvir tað økið, hann skuldi herseta. Og tað gjørdi hann eisini nú, og tann sálarliga kenslan, hann fekk av hesum, avgjørdi, hvussu hann síðani skipaði fyri.

Álopið á danska markið skuldi fara fram árla á morgni, og stutt frammanundan reikaði Montgomery einsamallur um og hugdi inn í Danmark.

Brádliga sá hann eina sjón. Ein skari av hvítum einglum kom til sjóndar við markið, og tað var, sum onkur segði við hann: „Tú mást ikki leypa á.“ Mest sum fram fyri seg sjálvan svaraði hann: „Tí sleppi eg ikki undan. Eg verði noyddur at gera eftir teimum boðum, sum eg havi fingið.“ Tá hoyrdi hann aftur røddina: „Tær nýtist ikki at fáa høvuðbrýggj av tí, tí tú fert ikki at leypa á.“

Grundandi yvir hesa merkisverdu sjón vendi Montgomery aftur til høvuðsstøð sína, ógvuliga rørdur av teimum orðunum, hann hevði hoyrt. Hvussu skuldi hann sum hermaður sleppa undan at gera tað, sum var álagt honum? Hann mátti gera skyldu sína, sjálvt um hann ikki eina løtu ivaðist í, at sjónin var ektað.

Hann kom kortini ongantíð so langt sum at leypa á, tí áðrenn morgunin kom, høvdu týskarar yvirgivið seg.

*„Et Ord med på Vejen“ – Effie Campbell umsetti.*

# Fangaður í egnum kroppi

***Svein Nordvik***

*Sum trúgvandi eiga vit at vera fráhaldandi.*
*Ein av andans fruktum er fráhald. (Gal. 5,22).*

Tá ið eg var smádrongur, setti eg mær fyri, at eg skuldi so víst ikki fara at líkjast pápa mínum. Hann drakk illa. Men so gjørdist tað móti at drekka eitt glas av víni, so tað mátti eg so avgjørt royna.

Eg gjørdist bitin av tí og endaði sum rúsevnismisnýtari. Eg gjørdist fangi. Ikki ein sovorðin, sum situr aftan fyri tjúkkar veggir og jarnstengur. Eg bleiv bundin og fangi í egna kroppi mínum. Brennivínsdjevulin hevði bundið meg.

„Drekkið ongantíð fyrsta glasið," tað er mítt ráð til tey ungu. Alt tað, sum henda verð hevur at bjóða er tómleiki, fáfongd og jagan eftir vindi (Præd. 1,14), um tað so eitur bilur, hús ella rúsur. Og veitst tú hví, at vit menniskju blíva so skraltóm, stutt eftir at vit hava roynt at fylt okkum við hesum lutum? Jú, tí at Gud hevur lagt ævinleikan niður í hjarta okkara (Præd. 3,11). Hatta rúmið kann bara Jesus fylla. Tað er bara hann, sum kann gera okkum nøgd og glað. Og hann skal hava hvønn krók í hjarta okkara, eisini tann krókin, har vit hava hug at seta „Loyniligt" á, og har vit goyma alt tað myrka í okkara lívi, at hyggja at porno, bara drekka eitt glas o.s.fr. Friðurin streymar ikki inn í okkum, fyrr enn vit yvirgeva alt til Jesus, tí tá má djevulin rýma, tí tá hevur hann ongan knagga at heingja sín hatt uppá.

Tí havi eg valt ikki at ganga mín egna veg og gera mær sjálvum til vildar; men eg havi valt at ganga tann vegin, sum Jesus vísir mær á. Eg vil hava meir av Jesusi, eg haldi meg so nær honum sum gjørligt. Eg skal jú vera saman við honum í allar ævir.

Á okkara døgum eru tað summi, sum siga, at tú skalt ikki tosa um at játta syndirnar. Jú, so sanniliga! Játtið syndirnar, fyri at tit kunnu blíva grøddir (Ják. 5,16), sigur Bíblian.

Í 20 ár havi eg nú tænt Jesusi. Hann sigur: „Fylgið mær eftir, so vil eg gera tykkum til mannafiskarar" (Matt. 4,19), ella við øðrum orðum: Eg vil gera tykkum til eitt vitni. Men hvat gera menniskju í dag? Tey tala bara inni í sínum egna møtisali, har meginparturin er frelstur frammanundan. Tað er sum at standa og fiska í einum aliringi. Nei, vit skulu út – út, har sum fiskurin er. „Farið út um allan heimin" (Mark. 16,15), stendur tað í mínari Bíbliu. Og tað nyttar! Eg havi biðið til frelsu við fólki í fótgangarateiginum, inni í handilsmiðstøðini, í fangahúsum, allastaðni.

Nógv vita ikki, hvørjum tey leita ella tráa eftir. Vit, sum kenna svarið, mugu rætta teimum Jesus. Tað hevur skund, tí Jesus kemur skjótt aftur. Og gita, um tey vilja blíva frelst? Tá ið eg spyrji tey, svara tey ja beinanvegin.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hygg

*„Men vit allir, sum við óskýldum andliti avspegla dýrd Harrans, vit verða ummyndaðir til hina somu mynd frá dýrdleika til dýrdleika, við tað at tað kemur frá harra andans.“*
*2. Kor. 3,18.*

Tá ið Dávid **hugdi** upp á Batsebu, fall hann í synd.
Tá ið Pætur **hugdi** niður á vatnið, var hann um at søkka.
Tá ið Pætur **hugdi** at gentuni í garðinum hjá høvuðsprestinum, svór hann tríggjar ferðir uppá, at hann ikki kendi Jesus.
Tá ið Elia **hugdi** upp á Jesabel, flýggjaði hann út í oyðimørkina.
Tá ið Eva **hugdi** upp á træið, sá hon, at fruktin var góð, hon át og fall í synd.

Sum tað er ræðuligt at hyggja skeivan veg!

Sum tað er undurfult at hyggja rættan veg!

Job var klókur: „Eg gjørdi sáttmála við eygu míni, at eg skuldi ikki **hyggja** at ungmoyggj.“ Job 31,1.

„Tey **hugdu** upp til Hansara – og lýstu av gleði, og andlit teirra rodnaðu aldri av skomm.“ Sálm. 34,6 V.D.

„Men tá ið teir hugdu upp, sóu teir ongan uttan Jesus einsamallan.“ Matt. 17,8.

Loyndarmálið viðvíkjandi trygdini um frelsu og syndafyrigeving – er at hyggja. At hyggja upp á Jesus, sum varð sendur av Gudi til jarðar at bera alla synd heimsins.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit eru fødd til at leiða menniskju til Jesus. Í hesum arbeiði er eingin skipað arbeiðstíð ella yvirtíðarløn. Men eg havi eina arbeiðsavtalu við hann. Hann gevur mær ikki nakran fallskíggja; men ágóðin verður ævigt lív. Eg havi heimsins besta arbeiði.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27. august | **Tekstur:** | Luk. 8,22-25 | **Bíbliuorð:** | Luk. 8,25b |
| 3. sept. | **Tekstur:** | Jóh. 1,18b; 11,3-4 + 17-44 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 11,25 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74